KÍ-liðskiparin, Ragna Andreasen:

# -Lættari enn væntað

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*

KÍ-liðskiparin, Ragna Andreasen, spældi í ár sína fimtu steypafinalu síðan 1996, og hon var væl nøgd við avrikið hjá liðnum.

- Vit vóru nógv betra liðið í dag, og eftir frálíku byrjanina uppá dystin, var ongin ivi um hvør fór at vinna dystin, segði KÍ-verjuleikarin eftir finaluna.

Ragna vísti eisini á, at hóast KÍ-liðið hevur vunnið á HB í landskappingini, so varð dysturin væl lættari enn væntað. Steypafinalur eru altið serligar, og undan dystinum, hevði eg vænta ein nógv tættari og meiri spennandi dyst

Ragna greiddi eisini frá, at KÍ-liðið var eitt sindur fjálturstungið undan finaluni, tí undanfarin ár hevur ikki gingið teimum væl í steypafinalunum. Sjálv hevur Ragna luttikið í fimm finalum undan henni í ár, og bert einaferð hevur eydnast henni at vinna finaluna, so tað var væl skilligt at, at hon var fjálturstungin undan dystinum.

- Vit er aldrin vísar, hvørjar leikarar HB hevur við til finalurnar, og tí vóru vit eitt sindur nervøsar undan dystinum, segði Ragna Andreasen við Sosialin.

Spurd um vánirnir til seinnu hálvu, svaraði Ragna, at málið er avgjørt at vinna greipuna.

– Vit hava verið besta liðið í ár, og halda vit fram at spæla, sum vit hava gjørt í ár, so meti eg, at vit verða torførar at taka, segði liðskiparin eftir finaluna.



*Ragna Andreasen og KÍ kunnu nú fegnast um steypasigurin, og stevna nú ímóti greipuni.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Steypakappingin hjá kvinnum:**

**1990:** HB-Skála 3-1 eftir longda leiktíð
Helga Ellingsgaard, sjálvmál og Kára á Dunga - Ingun Hansen
**1991:** B36- HB 1-0
Anja Rein
**1992:** Skála-VB 2-1
Ingun Hansen 2
- Jona Dahl,
**1993:** B36-ÍF 2-1
Judith Joensen og Eyðdis Reinert - Durita Eliassen
**1994:** B36-ÍF 4-2 eftir longda leiktíð
Anja Rein, Súna Mørk, Majbritt Joensen og Brynhild Klein - Linda Toftegaard, Majbritt Lervig
**1995:** B36- Sumba/VB 2-1
Eyðdis Reinert og Brynhild Klein - Mary Krosslá
**1996:** HB-KÍ 3-1
Sigrun Mikkelsen, Ann Hansen og Helga Ellingsgaard - Sólva Eystberg
**1997:** B36- KÍ 5-1
Judith Joensen 2, Rakul N. Joensen 2 og Arnbjørg Danielsen- Maria Jacobsen
**1998:** HB-B36 2-1
Eyðvør Thomsen og Theresa Johnsson- Rakul N. Joensen
**1999:** HB-KÍ 4-3
Eyðvør úr Dímun 2, Helga Ellingsgaard og Eyðfríð Kristiansen - Malena Josephsen 2 og Rannvá Andreasen
**2000:** KÍ-HB 2-0
Una Olsen og Rannvá Andreasen
**2001:** HB-KÍ 3-3 (8-7)
Helga Ellingsgaard 2 og Vivian Thorleifsson - Bára Skaale 2 og Malena Josephsen
**2002:** KÍ-HB 6-1
Rannvá Andreasen 2, Vivian Bjartalíð, Bára Skaale, Malena Josephsen og Elsa Maria Simonsen - Ása úr Dímun

Finalan í steypakappingini hjá kvinnum í ár var tann 13. í røðini. Til í 1997 varð kappast um Dagblaðssteypið. Eftir at B36-kvinnurnar vunnu í finaluni í 1997 á KÍ, fekk árstalsfelagið Dagblaðssteypið til ognar. Fyri at vinna steypið til ognar, skal eitt felag vinna steypakappingarnar fimm reisur.

Síðan 1998 hevur verið kappast um FSF-steypið, og higartil hevur HB luttikið í øllum finalunum. Havnarkvinnurnar hava vunnið tríggjar ferðir, og KÍ-kvinnurnar tvær ferðir.

Málríkastu dystirnir hava verið millum HB og KÍ, har heili sjey mál hava verið skotin í finalunum í 1999 og í ár. Í finaluni í ár var eisini størsti málmunur millum finalistarnar- heili fimm mál. Gamla metið var frá 1997, tá B36 fekk fýra mál fleiri enn KÍ, tá endaði dysturin 5-1 til B36.

Helga Ellingsgaard hevur skotið flest mál í steypafinalunum higartil, hon hevur skotið fimm mál. Helga skeyt mál í finalunum í 1990, 1996, 1999 og 2001.

Seks feløg hava verið umboðað í steypafinalunum hjá kvinnum. Tey eru B36, HB, KÍ, VB, Skála og ÍF. Fýra feløg hava vunnið steypakappingina, tey eru B36, HB, KÍ og Skála.

*phj*



*Steypavinnarnir úr Klaksvík í ár, hava vunnið steypakappingina tvær ferðir, síðan farið var undir steypakappingar fyri kvinnur í 1990*

Eyðfríð Kristiansen:

# - Ikki óvæntað



*Eyðfríð Kristiansen var ikki ovfaran at, at HB mátti leggja rygg til ein lemjandi ósigur í steypafinaluni á ólavsøku*

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*

Eiðiskvinnan á HB-liðnum, Eyðfríð Kristiansen, var ikki so ovfarin av úrslitinum í steypafinaluni.

– Vit vistu, at KÍ-kvinnurnar hava eitt betri lið enn okkara, og tí var úrslitið ikki so óvæntað segði miðvallarin eftir dystin.

Eyðfríð vísti eisini á, at byrjanin uppá dystin oyðilegði taktiska uppleggið, tí ætlanin var at halda fast fyrsta hálva tíman, og harvið frustrera KÍ-liðið, men hetta miseydnaðist fullkomiliga, greiddi Eyðfríð frá.

Eyðfríð Kristiansen hevur verið í steypafinalum seinastu fimm árini, og finalan í ár verður avgjørt ikki ein, ið hon fer at minnast á aftur við gleði. Eyðfríð hevur vunnið tríggjar finalur seinastu árini, meðan tvær finalur eru taptar.



# KÍ basti B36 á ólavsøku



*Hjalgrím Elttør skeyt seinasta málið í ólavsøkudystinum millum B36 og KÍ*

**Ólavsøkudysturin millum B36 og KÍ á Tórsvølli endaði við einum sannførandi 3-1 sigri til klaksvíkingar**

FÓTBÓLTUR
*Heini í Skorini*

Heilt fitt av fólki var savnað á Tórsvølli í góðveðrinum til ólavsøkudystin millum B36 og KÍ á Tórsvølli ólavsøkuaftan. Fýra mál og fleiri málmøguleikar var tað, áskoðararnir fingu, men hóast tað var dysturin ikki vælleiktur, og støði var sum væntað heldur ikki í topp, tá dysturin "bert" var ein vinardystur.

B36 hevði rímiliga gott tak á dystinum í fyrra hálvleiki, men hóast tað legði KÍ seg á odda beint áðrenn hálvleik, tá Allan Mørkøre sera vakurt skeyt beinleiðis fríspark uppum múrin og í netið. Stutt inn í seinna hálvleik var aftur galið hjá B36, tá KÍ liðskiparin Jan Joensen eftir trunkaspæl kundi økja til 2-0.

B36 spældi illa í seinna hálvleiki, men hóast tað megnaðu teir at minka um munin og harvið seta spenning aftur í dystin, tá John Petersen eftir hornaspark skallaði bóltin í málið. Men KÍ svaraði aftur móti endanum av dystinum, tá Hjalgrím Elttør eftir einmansavrik skeyt besta málið í dystinum. Eftir at hava fanga bóltin á nakað frammanfyri miðjuna, fór hann framvið fleiri B36 leikarum og setti síðani bóltin trygt í netið til 3-1 til KÍ, sum var endaliga úrslitið.

### Henrik sá nógv landsliðsevnir

Landsliðsvenjarin Henrik Larsen var til staðar á Tórsvølli, og fleiri landsliðsevnir gjørdu um seg í dystinum. Hóast teir ikki eru í landsliðshitanum í løtuni, hava tveir av KÍ málskjúttunum, Allan Mørkøre og Jan Joensen, verið á landsliðnum, og teir tóktust vera væl fyri.

Hinir báðir málskjúttarnir vóru landsliðsleikararnir John Petersen og Hjalgrím Elttør, og serliga var Hjalgrím sera vælleikandi.

Aðrir landsliðsleikarar, sum spældu fyri eygunum á Henrik Larsen, vóru Jákup á Borg, Julian Johnsson, Arnbjørn Danielsen, Klæmint Matras og Heðin á Lakjuni.

# Rigmor og Bogi vunnu sannførandi

**Rigmor Napoleonsdóttir og Bogi Lenvig gjørdust sannførandi vinnarar í ólavsøkurenningini 27. juli. Positiva yvirraskilsi var annars, at 19 ára gamli klaksvíkingurin Símun Joensen, sum fyri fyrstu ferð roynir seg í føroyskari kapping, gjørdist nr. 2**

ÓLAVSØKURENNING
*Heini í Skorini*

Við 50 sekundum framman fyri nr. 2 á fimm kilometra teininum var Bogi í einum klassa fyri seg í ólavsøkurenningini í regninum á Skálatrøð 27. juli. Tíðin hjá Boga Lenvig var 15 minuttir og 55 sekund. Bogi legði seg beinanvegin á odda, og helt hann síðani støði teir fimm kilometrarnar, uttan at nakar av hinum rennarunum megnaði at hótta oddasessin hjá Boga Lenvig.

Heilt óvæntað gjørdist 19 ára gamli Símun Joensen úr Klaksvík, sum nøkur kanska kenna frá fótbóltinum, nr. 2, og er hetta fyrstu ferð, hann luttekur í føroyskari kapping. Hóast hann var 50 sekund seinni á mál enn stóri sigursharrin Bogi Lenvig, noyddust nøvn sum Guttorm Sørensen og Cecil Weihe at lúta fyri Símun Joensen. Á triðja plássi var Guttorm Sørensen, meðan Snorri Patursson gjørdist nr. 4.





*Rigmor Napoleonsdóttir vann kvinnurenningina á ólavsøku, og var hon 16 sekund frammanfyri nr. 2 á 5 kilometra teininum*





*Símun Joensen, her í miðjuni, gjørdist nr. 2, meðan Guttorm Sørensen vinstrumegin gjørdist nr. 3. Í bakgrundini sæst Snorri Patursson, sum kom á mál á fjórða plássi*

### Rigmor enn einaferð

Hjá kvinnunum var Rigmor Napoleonsdóttir enn einaferð á ovastu rók tá avtornaði. Eins og Bogi Lenvig hjá monnunum tykist hon vera einaráðandi í føroyskari renning millum kvinnurnar, og var hon 16 sekund frammanfyri Borgarhjørt Holm, sum gjørdist nr. 2. Eftir Rigmor og Borgarhjørt var rættiliga langt til Tordis Debes Eiriksfoss á triðja plássi, sum kom á mál umleið tríggjar minuttir eftir Borgarhjørt Holm á øðrum plássi.

**Vegna plásstrot verða tíðirnar hjá øllum rennarum í øllum aldursbólkum prentað í blaðið í morgin**